# Fótbóltssøga í jólakalendara

Hóast teir teljast millum smærru feløgini í landinum, so plaga tey í B71 ikki at smæðast burtur í mun til onnur feløg í landinum. Tað hava tey áður prógvað á vøllinum, og seinnu árini hevur hetta eisini verið sjónligt á alnetinum.

www.b71-sandoy.com man í øllum førum vera ein av virknastu heimasíðunum í landinum, og nú jólini stunda til, er eisini ein jólakalendari at finna á síðuni.

Í teimum 24 lúkunum, sum eru á kalendaranum, verður á ymsan hátt greitt frá viðurskiftum, sum hava við føroyskan fótbólt at gera. Gjarna verður trivið væl aftur í tíðina, og eitt nú snúði kalendarin seg í gjár um, tá Liktenstein í 1982 beyð føroyska fótbóltslandsliðnum at spæla vinardyst. Ein avbjóðing, sum Føroyar tó ikki tóku av. Fyrst og fremst, tí fíggjarliga orkan ikki var til tess.

Hendingarnar verða lýstar við greinum, sum hava staðið í føroysku bløðunum um evnini, og fyri tann fótbóltshugaða føroyingin er talan heilt greitt um nógvar áhugaverdar - og til tíðir stuttligar - frásagnir. Hartil hevur webmaster hjá B71 í eisini sammett støðuna tá við hana í dag, soleiðis at hendingarnar onkursvegna verða settar í relief til fótbóltsheimin - anno 2005.



*B71-sandoy.com man vera ein av virknastu fótbóltsheimasíðunum í landinum. Nú er so eisini ein bæði stuttligur og áhugaverdur jólakalendari at finna á síðuni*

























